


**Nr. 25** **13. desember 2015** **75. árg.**

# Einglarnir syngja fyri

Tá ið okkurt ilt rakar okkum sum einstaklingar ella sum felagsskap, kann ivin taka seg upp: Er Gud veruliga góður? Vil hann menniskjanum, sum hann hevur skapað, veruliga tað besta?

Ja, hann gleðist um menniskjað og hevur tokka til tað, sigur Bíblian. Tí hevur Gud gjørt alt fyri at bjarga menniskjanum burtur úr fylgjunum av oyðing og deyða, synd og óndskapi. Hann sendi tað dýrabarasta, hann átti, sín egna Son, niður á jørðina, og Jesus Kristus gav seg sjálvan fyri okkum.

Tann veruleikan verður tú ikki liðugur við, tá ið tú sært, hvør ætlanin er við gávuni. Tey, sum vilja taka ímóti jólaboðskapinum í trúgv, fáa lut í henni. Tá gerst tú glaður og kennir eina ófatiliga jólagleði – alt árið. Einglarnir á Betlahemsfløtum syngja fyri í lovsanginum: “Heiður veri Gudi í hægsta himli, og friður á jørð og í menniskjum góður tokki!”

*Heilaga stund, tú á fold vára dalað ert niður,*
*nú kemur gleðin hin stóra, hvør klaga hon tigur,*
*føddur er hann, maðurin mikli,*
*ið vann størsta og fullbesta sigur.*

*Heimsins fólk gleð teg og syng tínum drotti at prísa*
*hann móti ljósi tær beinasta vegin vil vísa,*
*leiðir tín fót, gevur tær megi og mót,*
*myrkasta skot upp kann lýsa.*

# Um tú ert til, Gud, so...

Ein maður vitnaði niðri á Blákrosskaféini nú eitt kvøldið:

Eg búði nokk so nógv ár í Íslandi, og eg var illa fyri, tí eg var so bundin av ymiskum, serliga av hassji, alkoholi og ymiskum rúsevnum. Eg var í dýrastu neyð, tí eg vildi sleppa av við alt hetta, sum bant meg niður, og eg royndi ymiskt. Eg fór til avvenjingar. Tað hjálpti eina tíð; men so datt eg útí aftur. At enda var eg so móður, so móður, at eg orkaði snøgt sagt ikki meir.

Eg fór til eina lítla bygd, sum lá langt har frá, sum eg búði. Tá ið eg kom hagar, fór eg oman á bryggjuna, og eg ætlaði mær at leypa útav. Eg snaraði mær á. Har var ikki eitt menniskja. So lyfti eg hondina upp móti himli og segði: "Um tú ert til, Gud, hjálp mær so!!!"

Í somu løtu sendi Gud ein tanka niður í meg. Hann segði, at eg skuldi fara niðan til eini ávís hús har í bygdini. Hann segði einki annað enn tað. Húsini vóru lítil og gomul. Eg hevði ongantíð verið har fyrr; men eg visti, at húsfólkini vóru trúgvandi. Eg bankaði uppá og kvíddi fyri, hvat ið eg skuldi siga, tá ið tey lótu upp. Men tey vóru so hjartans blíð og ynsktu mær vælkomnum og søgdu: "Kom inn, kom inn!"

Tað vísti seg, at tey høvdu biðið fyri mær í eina tíð, og nú kom bønarsvarið. Eg fall á knæ og varð frelstur og loystur, og eg fekk ein undurfullan frið inn í mítt hjarta. Tey søgdu við meg, at eg kundi búgva hjá teimum so leingi, sum eg vildi. Eg búði har í tríggjar mánaðir. Íbúðin var lítil, tey høvdu bara eitt kamar og so eitt pinkalítið afturat. Tey flutt inn í tað lítla kamarið saman við sínum trimum smábørnum, og mær góvu tey sítt kamar. Hetta vóru av sonnum gudsóttandi fólk, sum livdu út sín kristindóm.

Tá ið eg bað Gud frelsa meg, bað eg hann um eitt afturat: "Góði Gud, gev mær eina konu. Hon skal vera trúgvandi og úr Føroyum." Og Gud hoyrdi ta bønina. Hann sendi mær konuna upp til Íslands, og vit giftust. Nú hava vit verið gift í 22 ár. Eg eri Gudi so takksamur fyri mína konu. Eg eigi ikki orð fyri, hvussu góða konu eg havi.

Eg takki og lovi Gudi fyri hansara stóru náði og góðsku móti mær og mínum.

*Effie Campbell* umsetti.

# At vera nøgdur

*Men tá ið vit hava føði og klæði, skulu vit vera nøgdir við tað.*
*1.Tim. 6,8*

Paulus var nøgdur við lívskor síni, tó at tað viðhvørt var ógvuliga stríggið á ferðum, í vanda, í fangahúsi, í handverki (tjaldmakari) og samstundis altíð á ferð at boða gleðiboðskapin, men hann átti tað, sum er meira enn heimsins ríkidømi og dýrgripir: Guds náði, og hann hevði lært, at Guds náði er nóg mikið.

Vit mugu eisini sum Guds børn læra at vera nøgd við lívskor okkara. Ikki soleiðis, at vit ikki skulu stremba eftir at bøta um tey – ein góð stremban, sum fellur vaknum ungdómi natúrlig. Men henda strembanin kann eydnast okkum, um vit samstundis eru nøgd við tað, sum longu er fallið okkum í lut, og vit hava lært at takka Gudi fyri tað. Takksemi gleðir okkum og økir um arbeiðsgleðina.

Gud hevur ongantíð lovað børnum sínum vælferð ella at liva í fagnaði og góðgæti, men hitt dagliga breyðið og alt, sum okkum tørvar.

*t.* týddi.

# Avbjóðingin

Okkara boðskapur er, at Jesus úr Nasaret livir í dag. Hann og bara hann kann broyta menniskju og tjóðir. Tað eru ikki teir politisku flokkarnir, sum bjarga landi okkara.

Avbjóðingin, sum hann gav sínari meinigheit, er: “Farið út um allan heimin!” Kortini virkar tað, sum summar meinigheitir og kirkjur eru flutt inn í bumbuskýlið. Jesus segði: “Farið út í allan heimin og boðið gleðiboðskapin,” men vit eru av sonnum vorðin ov lítið áhugað í tí, at Jesus doyði fyri okkum, og staðin fyri hava vit avbyrgt okkum.

Hvat man Jesus halda, tá ið hann sær niður yvir land okkara? Man hann gráta? Vit kunnu ikki hvíla nú! Tað fara vit at gera í himli! Vit mugu heldur siga: Harri, her eri eg, send meg!

Vit mugu ikki halda okkum aftur, vit mugu liva eitt meira “áleypandi” kristnilív, tí vit hava kærleikans boðskap at rætta teimum. Hvør skal taka ábyrgd fyri landi okkara? Jú, tað skulu tú og eg. Vit skulu tala og ikki tiga.

*Effie Campbell* umsetti.

# At halda seg nær at Gudi

Til eru orð, sum eru slitsterk, og sum fólk ígjøgnum øldir hava leitað aftur til. Í dag skulu vit taka eitt slíkt orð hjá kirkjufaðirinum Augustin. Hann sigur:

*"Legg fortíðina yvir á Guds miskunn, nútíðina á Guds kærleika og framtíðina á Guds forsjón."*

Ikki er bara lætt at fylgja eini slíkari áminning, tí sinni okkara er tvíbýtt, og stundum vilja vit hetta og stundum hatta. Ikki altíð er ynski okkara at vera Gudi nær.

Men best er at sleppa ákærunum frá fortíðini. Legg tær yvir á Gud. Tú gert rætt, um tú leggur dagin í dag yvir á Guds kærleika og framtíðina yvir á Guds forsjón.

Bíblian sigur: "Haldið tykkum nær at Gudi, so skal hann halda seg nær at tykkum. Reinsið hendurnar, tit syndarar, og tváið hjørtuni, tit tvílyntu." (Ják. 4,8)

*Legg tínar sorgir á Harran , tín Gud,*
*viltur í skyggjandi gulli ei er hann,*
*suff tíni telur hann, tár tíni ber hann*
*so tú í dýrd hans og sælu fært lut.*

# Hvat hevur týdning?

Tá ið vit hava verið deyðsjúk, so ristir tað í okkara virðir, og tað fær okkum at umhugsa okkara raðfestingar av nýggjum, hvat ið tað er, sum av sonnum hevur týdning. Vit verða mint á, at vit hava eina avmarkaða tíð, og tá fær tað sosiala og sambandið til tey rundan um okkum størri týdning, og vit skilja, at vit eru ómetaliga bundin at øðrum menniskjum. Hvat skal til, fyri at fáa okkum at vakna og skilja, hvat ið hevur týdning tey fáu árini, vit liva á hesi jørð.

*e.c.* ums.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 13. des. | Tekstur: | Luk.1,26-38; | bíbliuorð: | Luk. 1,28b |
| 20. des. | Tekstur: | Luk.2,1-20; | bíbliuorð: | Luk. 2,10-11 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




**Nr. 26** **27. desember 2015** **75. árg.**

# Jesus Kristus er um allar ævir hin sami

*Jesus Kristus er í gjár og í dag hin sami og um allar ævir.*
*Hebr.13,8*

Hetta er eitt gott orð at taka fram, nú ið vit fara um eitt árskifti. Tankarnir leita aftureftir, og vit steðga mangan á. Hjartasuff um vónbrot og niðurløg. Beisk minnir um spiltar møguleikar. Og mangt annað. Men fyrst og síðst eiga vit at takka fyri góðar gávur, sum vit fingu á leiðini.

Summi halda, at árið gjørdist eitt løgið ár, tí stórar kollveltingar hendu í teirra lívi. Summi fara at halda, at hetta var eitt hart ár, tí tey mistu nakað av tí dýrabærasta, tey áttu. Summi halda, at hetta var eitt ár sum flest onnur; lívið gekk sína vanligu gongd og var ein blandingur av sorg og gleði, sum tað nú plagdi at vera. Summi upplivdu ta stóru eydnuna, og at sólin skein á teirra veg.

Men nú siga vit gamla árinum farvæl. Ikki er nóg mikið at skála við sjampanju, meðan skotini gella, og rakettirnar verða sendar upp, meðan kirkjuklokkurnar ringja síni tólv sløg. Slíkt er bara ein flýggjan frá veruleikanum. – At mála svartar myndir á veggin og geva túsundtals gremjingum rúm, er heldur ikki nógv vert. Tað er eisini flýggjan frá veruleikanum á ein annan hátt og ótakksamt mótvegis honum, sum til henda dag hevur hjálpt okkum.

Tað, sum vit á ársins síðsta degi hava allarmest tørv á, er at gera álvara av at trúgva á Jesus, sum í gjár og í dag og í morgin og altíð er hin sami. Hann er óbroytiligur, og lyftir hansara eru altíð at líta á. Steðga á eina løtu! Men tíðin steðgar ikki á,

og endin er nærri enn hann var í gjár. Vit mugu víðari. Vit líta vestureftir og eystureftir og suffa lættan, tá ið vit síggja tekn um avspenning og frið. Men fyrst og síðst mugu vit ásanna: “Tíð mín er í tínum hondum, Harri, og eina tú ræður fyri friði okkara.”

So takka Gudi á hesum ársins síðsta degi! Takka fyri teir mongu ljósu tímarnar og góðu korini! Takka honum, tí Jesus kom at frelsa okkum frá syndarinnar og deyðans og djevulsin valdi! Takka honum, tí Jesus í gjár og í dag og um allar ævir er hin sami. – Og so fara vit víðari og ynskja hvørøðrum í Jesu navni. GOTT NÝGGJÁR!

# Guds jólagáva til tín

Tá ið vit jólaaftan fara í eina fullsetta kirkju og hoyra hesi vøkru orðini úr Luk. 2,1-11, verða vit øll ávirkað. Teksturin er um Mariu, føðingina, krubbuna í fjósinum, hirðarnar og einglarnar, teir, sum bera tey stóru tíðindini:

”Og tað vóru hirðar har í sama bygdarlagnum, sum lógu úti á markini um náttina og goymdu at seyðafylgjum sínum. Og sí, eingil Harrans stóð hjá teimum, og dýrd Harrans ljómaði rundan um teir, og teir vórðu ógvuliga óttafullir. Og eingilin segði við teir: ”Óttist ikki; tí sí, eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu verða fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði! Og hetta skulu tit hava til merkis: Tit skulu finna eitt barn reivað og liggjandi í eini krubbu.” Og í somu stund var hjá einglinum ein fjøld av himmalskum herskarum, sum lovaðu Gudi og søgdu: ”Heiður veri Gudi í hægsta himli og friður á jørð í menniskjum, sum Gud hevur tokka til.”

Hetta er so vakurt, so stórt, so reint og guddómligt. Tað hevur allar tættir í sær, sum vísa Guds kærleika til okkum menniskju, og tað stóra er, at øll eru roknað uppí. Gud ger ikki mannamun. Øll eru við, Gud hevur tokka í okkum menniskjum.

Tí er jólasiðvenjan og okkara kristni mentanararvur so týdningarmikil. Hann peikar á okkara røtur og vísir vegin inn í ævinleikan. Tá ið eitt samfelag verður avkristnað og verðsliggjørt, missa vit virðingina fyri Gudi og síðani virðingina fyri natúruni og medmenniskjum, skapt í Guds

mynd. Tá fáa vit eitt kalt samfelag, har eingin leggur í næsta sín. Tá verður tað eg og mítt, sum telur.

Eg takki Gudi, at eg eri føddur í einum landi, har eg havi hoyrt evangeliið frá barni av. Takk fyri mammu og pápa, mínar ommur og abbar. Ikki minst, túsund takk fyri, at eg slapp at møta Jesusbarninum í krubbuni, og uppaftur størri er tað at hava tikið ímóti tí upprisna Frelsaranum, Jesusi Kristi.

Nú á jólum síggja vit ljósini úr teimum túsund heimunum har niðri í býnum, og eg hugsi: Eg vóni, at øll fáa ein signaðan jólaaftan, og at tey fara at møta tí upprisna Jesusi Kristi. Jólini eru ein gleðishátíð, og tá skulu vit gloyma tað, sum er keðiligt og ónt. Sum tað stendur í Neh. 8,10: ”Og hann segði við teir: ”Farið nú og fáið tykkum feitar krásir at eta og søtt vín at drekka og latið burturav til teirra, sum einki hava, tí at hesin dagur er halgaður Harra várum; verið nú ikki stúrnir, tí at gleðin í Haranum er styrki tykkara.”

Sjálvandi eru jólini ein sár og viðbrekin tíð hjá teimum, sum hava upplivað sorg í farna ári. Kanska hava tey mist ein av sínum kæru, ella hava verið úti fyri ymsum royndum, eitt nú sjúku, hjúnaskilnaði, arbeiðsloysi ella húsagangi. Uttan mun til hvat, ger sum Skriftin sigur. Gleð teg um Jesus, sum kom at frelsa okkum. Minst til, at gleðin í Harranum skuggar yvir alla sorg og allar royndir. Minst til, at gleðin í Harranum er tín styrki.

So er bara eftir at siga: Eini vælsignaði, góð jól. Minst til, tú ert taldur uppí.

*Effie Campbell* umsetti.

# Er Gud deyður?

Ein smágenta hevði fingið nýggja mammu, av tí at mamma hennara var deyð. Ein dagin spurdi hon pápa sín: ”Pápi, Gud man ikki eisini vera deyður, ha?”

”Hvussu ber tað til, at tú fært so løgnar tankar?” spurdi pápin.

”Eg havi bara hugsað so nógv um tað,” segði gentan, ”tí fyrr í tíðini bað tú altíð til Gud, men tað gert tú ongantíð longur.”

Orðini hjá smágentuni førdu til veking í heiminum.

”Kirkeklokken” *e.c. umsetti.*

# Trúgv orðinum

*Maðurin trúði tí orði, sum Jesus segði við hann. Jóh.4,50*

Jesus hevði sagt við kongsmannin, sum sonurin lá sjúkur hjá: “Far tú, sonur tín livir!” Og maðurin trúði tí orðinum, sum Jesus hevði sagt við hann. Og hann fór heim til hús. Hann trúði Jesu orðum, eins og hinir spitalsku trúðu orðinum um reinsan, tó at teir ikki sóu hana, tá ið teir fóru at vísa seg fyri prestunum.

At trúgva orðinum er ógvuliga týdningarmikið. Uttan hesa trúgv verða vit als ikki frelst. Men at trúgva orðinum er ikki hin frelsandi trúgvin, fyrr enn trúgvin og orðið hava okkurt við synd okkara og Guds náði at gera.

Vit kunnu tosa um, um vit trúgva Bíbliuni ella ikki – og tað eru tíverri mong, sum ikki trúgva Bíbliunnar sannleika; men tað eru eisini mong onnur, sum trúgva hesum sannleikanum frá fyrsta til seinasta blað í Bíbliuni. Men enntá henda trúgvin nýtist ikki at vera hin frelsandi trúgvin. Tað er hon ikki, fyrr enn orðið sleppur at døma teg, sum ein glataðan syndara, sum tørvar Guds náði í Jesusi Kristi, og um hetta sama Guds orðið sleppur at reinsa eitt menniskja til lívið í Jesusi og hansara fullgjørdu frelsu.

Trýrt tú veruliga orðinum? Hevur orðið dømt teg og reist teg?

*t.* týddi.

---

Hevur tú sagt børnum tínum, at Jesus er hin einasti, sum kann frelsa tey fyri ævinleikan?

*e.c.* ums.

*Sunnudagsblaðið*
*ynskir øllum eini gleðilig jól og Harrans signing í nýggja árinum!*
*Blaðstjórin.*

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk/fo**

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74